## GOG er bjargað

GOG Svendborg hevur seinastu tíðina verið í stórum fíggjarligum trupulleikum. Felagið hevur leitað eftir nýggjum íleggjarum, og tað hevur í fyrsta umfari eydnast. – Vit hava fingi 3,5 milliónur krónur. Men tað hevur ikki við sær, at vit gevast her, sigur Arne Buch við tv2sport.dk. Tað er sannlíkt, at felagið sleppur undan húsaganginum.



## Poulsen møguliga til Onglands

Christian Poulsen fer, sambært altjóða miðlum, møguliga at spæla við Liverpool í komandi kappingarári. Gazzetta dello Sport skrivar eitt nú, at Xabi Alonso er ávegis til Juventus, og Christian Poulsen, sum seinastu tvey árini hevur spælt í Juventus, fer til Liverpool. Danski miðvallarin hevur fyrr í summar sagt, at hann neyvan heldur fram í Italia eftir summarsteðgin.



- Tað er sjáldan, at vit vita so lítið um mótstøðuna, sum hesaferð, sigur Erik Hamrén, venjari hjá Rosenborg, í norskum miðlum

# Hamrén veit einki um mótstøðuna

**Erik Hamrén, venjari hjá Rosenborg, væntar sær ein torføran dyst í Gundadali í annað kvøld**



uni@sosialurin.fo

Uni Holm Johannesen

- Tað er sjáldan, at vit vita so lítið um mótstøðuna, sum hesaferð. Men vit eru til reiðar.

Tað er ongantíð lætt at sita í venjarasessinum. Tað má sviin Erik Hamrén sanna. Í annað kvøld stendur hann standa á odda fyri Rosenborg, sum vitjar í føroyska høvuðsstaðnum. Hóast hann staðfestir, at dysturin í Gundadali móti NSÍ verður torførur, so krevja fjeppararnir undirhald, málmøguleikar og nógv mál. Teir krevja ein norskan stórsigur.

### Torførur dystur

Erik Hamrén tók í gjár út leikarahópin, sum skal stríðast við runavíkingar. Roar Strand, Micke Dorsin og Marek Sapara vóru ikki at finna millum nøvnini. Venjarin sigur við rbk.no, at hesir hava tørv á hvíld og verða tískil verandi í Tróndheimi. Hinvegin eru Steffen Iversen, sum áður hevur spælt við enska Tottenham, og Rade Prica, sum hevur skotið eina rúgvu av málum í donskum fótbólti, við í ferðalagnum.

- Dysturin verður torførur. Tað eru dømi um fleiri lið, sum hava havt trupulleikar í Føroyum. Men eg vænti, at vit fáa eitt frálíkt úrslit, sigur Erik Hamrén við rbk.no

Sjálvsálitinum bilar í øllum førum einki í Rosenborg í løtuni. Liðið er ósigrað í heili 16 dystir, og tað skal í øllum førum ikki verða í Føroyum og í Gundadali, at frálíka gongdin fær sín enda.

- Eg veit millum lítið og einki um føroyskan fótbólt. Men vit eiga at vinna dystin, sigur Kris Stadsgaard, verjuleikari hjá Rosenborg, við RBK.no.

### Hópurin hjá Rosenborg:

**Málverjar:**
Rune Almenning Jarstein
Alexander Lund Hansen

**Verjuleikarar:**
Mikael Lustig
Alejando Lago
Kris Stadsgaard
Andresa Nordvik
Roy Miller
Vadim Demidov

**Miðvallarar:**
Per Ciljan Skjelbred
Alexander Tettey
Trond Olsen
Kjell Rune Sellin
Anthony Annan

**Framherjar:**
Rade Prica
Didiér Konan Ya
Dario Zahora
Steffen Iversen

## Fjepparar flenna at NSÍ

**Á eini fjepparakjaksíðu hjá Rosenborg verður dúgliga kjakast um uppgávuna hjá liðnum í morgin. Og tað eyðsæð, at teir vænta sær ein trivaligan sigur móti NSÍ í Gundadali í annað kvøld. Omanfyri eru nøkur av , sum ymsir fjeppar hava skrivað.**

- Hetta má helst líkjast einum sokallaðum WalkOver, ikki so?

- Møguliga eru teir ikki so vánaligir, hahaha?

- Mær vitandi kann føroyskur fótbóltur samanberast við norku aðru og triðju deild. Vit hava havt trupulleikar av tílíkum liðum áður...

- Eg tippi 7-0 til Rosenborg.

- Tað er imponerandi, at eitt lið úr einari føroyskari bygd hevur eitt fyrstalið, næstbesta lið, triðja lið OG eitt fjórða lið! Spæla øll fótbólt í Føroyum?

- Man to watch: Karoly Potemkin

- Teir eru ikki serliga raskir at dagføra heimasíðuna. Eg vildi mett, at uppgávan móti Rosenborg eru stórtíðindi har yviri.

- Helmingurin av liðnum hjá NSÍ eru landsliðsleikarar, uttan at tað sigur serliga nógv.

Uni

# Aldridge í Gundadali

**Fótbóltsskúlin í Gundadali, sum venjarar frá Liverpool Academy venja ungar og ágrýtnar føroyskar fótbóltsleikarar, byrjaði í morgun. Jens Kristian Vang, myndamaður, var í Gundadali í morgun, har John Aldridge, fyrrverandi Liverpool-leikari, millum annað legði ungdóminum lag á**

Uni

